tíðindablaðið
sosialurin
Internet: www.sosialurin.fo

Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov

Marknaðardeild: Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
Blaðfólk: Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dánjal Højgaard

Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Høgni Mohr
Ítróttur: Jákup Mørk

Myndamenn: Jens Kristian Vang, Ólvur Haraldsen
Útgevari, uppseting: Sp/f Sosialurin
Bústaður: Argjavegur 26, Argir

Postadr: Postsmoga 76, 110 Tórshavn
Telefon: 311820
Telefax. 314720
e-mail: post@sosialurin.fo
Lýsingar: lysing@sosialurin.fo
Prent: Sosialurin

Jenis rakti seymin á høvdið

Oddagrein

MILLUM mongu viðmerkingarnar eftir samráðingarnar í Danmark herfyri hava eisini verið tær hjá tingmanni Miðfloksins, Jenis av Rana. Eftir okkara tykki rakti hann seymin á høvdið, tá hann segði sína hugsan um samráðingarnar. Danska stjórnin hevur kunnað gjørt sær dælt av, um man kann siga tað so, hvussu góður føroyski búskapurin er í løtuni og setir út frá tí føroyingum stólin fyri hurðina. Hon vil ikki ganga við til longri skiftistíð enn 4-5 ár. Forsætisráðharrin brúkar m.a. stóra yvirskotið hjá landskassanum sum grundgeving. Tá føroyingar hava ráð til at leggja til síðis tað, sum svarar til 60 milliardir hjá eini danskari stjórn, so hava vit eisini ráð til at klára eina stutta skiftistíð.

POENGIÐ hjá Jenisi var og er, at landsstýrið, við at binda fyri landskassan og leggja sektina á, at stórur partur av samfelagnum koyrir út av tromini, í veruleikanum hevur sett fót fyri sær sjálvum og øllum tosi um sjálvstýri ella fullveldi. Tingmaðurin gjørdi sum eisini rætt er vart við tað høpisleysa í fíggjarpolitikk-inum, sum hevur til endamál at fylla kassan upp til komandi fullveldi, líka mikið, hvussu so sjúkrahúsverk, almannaverk, strandferðsla og aðrir týðandi almennir stovnar klára seg og sínar uppgávur.

FORMAÐUR Tjóðveldisfloksins sigur, at varni fíggjarpolitikkur hevur ikki nakað beinleiðis við fullveldið at gera. Tí eru vit ikki samdir í. At seta allar kreftir inn uppá at spara og spinka til fullveldið hevur sjálvandi við sær, at verandi almennir stovnar so sum sjúkrahúsverkið, ið longu eru niðurpíndir, ongantíð koma at liva upp til tað, sum vit annars fegin lata okkara skattapengar til. Nakað annað er, og eingin er ósamdur við landsstýrið um, at tað er rætt at leggja upp fyri til verri tíðir og leggja seg eftir at hava eitt yvirskot. Men tað órímuliga í hesum er, at henda kúvendingin í fíggjarpolitikkinum gongur alt ov skjótt fyri seg. Og grundin til at hon skal gera tað, er fullveldið. Her koma við til kjarnan: at tingini ganga alt ov skjótt, og at samfelagshjólini bráddliga skulu mæla í eini ferð, sum passar inn í fullveldispolitikkin hjá Tjóðveldisflokkinum.

ANTIN tú velur størri sjálvstýri ella fullveldi her og nú, so hevur eingin politiskur flokkur loyvi til at neyðtaka eitt samfelag á slíkan hátt, sum eisini fyrrverandi løgmaður Atli Dam viðmerkti í blaðnum herfyri. Stórar og kollveltandi samfelagsbroytingar sum hesar mugu hava sína tíð. Fólkið má sleppa at sodna tær og umhugsa tær. Øll lið í samfelagnum mugu sleppa at geara seg inn til nýggju tíðina. Og hetta kann rætt og slætt ikki lata seg gera við rakettferð. Tað má ein skipað og stigvís gongd til skal hetta kunna hava við sær minst møguligt av negativum árinum. Tað er hetta, sum nú er við at ganga upp fyri fólkafloksfólki og ikki minst sjálvstýrisfólki, tað fer at merkja landsfund Sjálvstýrisfloksins. Ein flokkur, sum altíð hevur vilja verið ímyndin av stig fyri stig politikki og sum hevur viljað farið hóvliga fram lat seg neyðtaka av Tjóðveldisrisanum. Ella rættari - ávís sjálvstýrisfólk hava lagt kropp til hesa neyðtøku - ikki baklandið - ikki grasrøturnar, sum nú tala harðliga at. Eitt nú í blaðnum í dag. Aftur til stig fyri stig politikkin hoyrast herrópini frá tí unga ættarliðnum av sjálvstýrisfólki. Spurningurin er bara um tíð til at hetta eisini fer at hoyrast frá fólkafloksfólki um alt landið. Formaður teirra hevur latið seg draga so langt út á djúpt vatn av Tjóðveldisflokkinum, at hann nú hevur ilt við at fóta sær aftur. Vendingar sum breið semja, lad os nu se ol. hava nú í langa tíð dult og fjalt, hvat løgmaður og formaður Fólkafloksins veruliga vil. Men hann veit innast inni, hvat hansara bakland vil, og tað er stig fyri stig sjálvstýri. Nakað, sum eisini Javnaðarflokkurin ynskir og vil.

Sosialurin

Lesarabrøv:

Tvey ára minni

Nú sunnudagin var valborgsmessuaftan, tí 1. mei er valborgsmessa. Tvey eru tí ár runnin síðan tað minniliga val, har føroyingar sópaðu burtur tær myrkursins kreftur, sum í øldir hava forðað okkum í at fáa fólkaræði í landi okkara. Vit valdu ein nýggjan løgtingsmeiriluta, sum vil at alt ræði yvir landi okkara skal vera hjá tí føroyska fólkinum, og at vit skulu fara úr tí ríki, sum vit higartil hava verið í, og sum síðan 1450 hevur verið í ríkjasambandi við tað danska ríkið.

Ikki kann sigast annað, enn at nógv er hent hesi bæði árini. Sjálvandi hevur landsstýri okkara samráðst við donsku stjórnina um hetta mál, og hava hesar samráðingar víst, at danska stjórnin ikki er fegin um at lata okkum fara. Hetta hevur hon helst sínar góðu grundir til, og fyri okkum er tað serliga áhugavert av tí at tað prógvar fyri okkum, at vit helst hava størri virði enn vit vanliga hugsa um.

Men tað mest áhugaverda er tó at síggja ta broyting, sum henda nýggja støðan hevur elvt til í tí føroysku andstøðuni.

Andstøðuflokkarnir eru teir, sum í veruleikanum hava havt valdið í Føroyum síðan 1906. Tað sum hevur givið teimum valdið hevur ikki verið teirra dugnaskapur, tí ikki kann sigast at teir hava prógvað at teir hava dugað at bygt upp eitt samfelag, sum hevur givið livilig kor og tryggleika fyri tað uppvaksandi ættarliðið. Hin vegin hava vit sað húsagangir í vinnulívinum og hópflyting av landinum av okkara uppvaksandi ættarliði. Kollin á hesum oyðingarverki sóu vit fyrst í nittiárunum, tá øll tann armóðsskipan, hesir flokkar høvdu bygt upp, fór á heysin við ræðuligum avleiðingum fyri alt okkara samfelag.

Men núverandi andstøðuflokkarnir hava havt meirilutan í Føroyum einum fyri at takka, og tað er tí danska statinum, sum á hvørjum ári er komin teimum til hjálpar við almennum veitingum, so teir hava kunnað játtað almennan pening uttan at krevja at veljararnir fyrst skulu gjalda hesar upphæddir í skatti.

Er hetta ikki genialt? Hugsa sær til at sleppa at brúka pengar uttan at hava stríðið av at fáa teir til vega!

Men tíverri hava vit í búskaparfrøðini eitt hugtak, sum eitur: Tað er einki, ið eitur ein ókeypis morgunmatur.

Tað sum nú kemur fram, er at núverandi andstøðuflokkarnir hava latið donsku stjórnini nakað afturfyri tann meiriluta, sum danski stuðulin hevur útvegað teimum í Føroyum. Hetta hevur verið dønum so virðismikið, at teir nú, føroyska landsstýrið bjóðar sær til at sleppa dønum frá at gjalda hesar pengar, opinlýst fordar tí í hesum verki.

So mikið hava vit longu funnið út av eftir tveimum árum, og tí er tað, at ein skjótt vaksandi meiriluti í Føroyum tekur undir við landsstýrinum í tess politikki um at vit sjálvi skulu hava fult vald í landi okkara.

Zakarias Wang,
30. apríl 2000

Prisen for selvstyre!

Den danske regering holder fast ved en overgangsordning på 3-4 år.

Landsstyret ønsker en nedtrapning af rigsudgifterne efter 15-20 år.

Der er langt mellem parterne.

Hvis rigsudgifterne falder for hurtigt, bliver det nødvendigt med store besparelser dvs. der sker en forhøjelse af skatter og afgifter.

Efterspørgelsen efter arbejdskraft mindskes, det vil skabe arbejdsløshed og medføre at folk flytter ud af landet.

Men andre ord, det bliver os, den almindelige lønmodtager, der kommer til at betale for landsstyrets ambitioner.

Vil vi det!!!

Jeg har absolut ingen ønsker om at blive pålagt yderligere besparelser, efter min mening er både skatter og afgifter høje nok.

Venlig hilsen
Doris Rasmussen
Trongisvágur

Væleydnaður skemtileikur í Sólarmagni

Tað er ikki á hvørjum degi at høvi býðst at síggja sjónleik á Velbastað. Tað er so lætt at lata alt fara fram í Havn, heldur enn at síggja til, at okkurt verður gjørt í heimbygdini av bygdafólkunum. Bæði vansar og fyrimunir eru hjá einari bygd at liggja einans hanagleiv frá høvuðsstaðnum. Henda støða hevur ikki bara verið fremjandi fyri tað sindrið av samankomingum, ið eyðkendi bygdalívið heiman fyri Reynið fyri o.u. einum mansaldri síðan.

Tí er ikki minni enn talan um eina stórhending at sjónleikur, aftan á ein steðg í eini hálvthundrað ár, aftur verður spældur í Sólarmagni.

2. páskadag var skemtileikurin "Gift teg" eftir norska høvundan Torvald Tu, frumsýndur fyri fullum húsi. Tað, at felagshúsið ikki er serliga stórt — rúmar eini 40 fólk til hvørja sýning — gevur eina heilt serliga uppliving av nærleika. Nakað, sum tú vanliga ikki upplivir í teimum størru leikhølunum í høvuðsstaðnum. Longu karmurin — húsini og rúmi, har leikað verður — seta sínar heilt avgjørdu avmarkingar til uppsetingina av leikinum, og tí var tað júst leikurin "Gift teg", ið ungu stigtakararnir av Velbastað valdu at fara í holt við.

Við góðari hjálp frá trimum royndum leikarum úr Nólsoy og Havn var farið undir at venja leikin, beint eftir føstulávint. Samstundis hevur verið arbeitt við at fáa pallin upp á pláss. Og sigast má, at tað er eitt stórt avrik, ið hesir sjey ungu og evnaríku leikarar, her hava greitt úr hondum. Tað er ikki bara sum at siga tað, at fáa alt tað handaliga, sum slíkt arbeiði krevur, at ganga upp. Tíbetur hava feløg, fyritøkur og einstaklingar verið sinnað at veita teimum eina hjálpandi hond, bæði við ráðgeving, leiðbeining, handaligari hjálp og fíggjarligum stuðli. Serliga er vert at nevna MáF, Havnar Sjónleikarfelag, Balslev og Ungmannafelagið Royndina í Nólsoy.

Gift teg er ein skemtileikur av tí góða, gamla slagnum, frá teirri tíðini, tá ið tað ráddi um at giftast við tí rætta/røttu. Hann fer fram í tí gamla bóndasamfelagnum, sum var fyri o.u. 50-100 árum síðan, og hóast Velbastað kann sigast at vera "bóndabygd" burturav, tann dag í dag, er neyvan nøkur grund til at halda, at giftarmálini verða sett í verk sum í hesum skemtileiki. Men hetta er heldur ikki so umráðandi. Harímóti er talan um eina góða søgu, ið sum frá líður kann tykjast torskild og fløkjalig, men ikki er tað kortini.

Spælið er lætt og ekta. Tey fimm korterini, leikurin varir, flúgva avstað. Hóast leikurin er av tí gamla slagnum, hevur tað hepnast leikstjóranum væl at fáa naka av tí nýggja málburðinum við, og soleiðis fáa skemti at sita. Tó at leikararnir eru ungir, er hetta eingin forðan fyri at skilja stóra aldursmunin á persónunum í leikinum. Sjálvsagt er ikki lætt hjá einari 19 ára gamlari ungmoy at spæla leiklutin sum eldri einkja. Men við smyrsli og hóskandi leikbúnum ber væl til at minka um munin.

Hóast onkur av leikarunum skaraði framúr, kann sigast øllum til rós, at teir megnaðu væl at halda leikinum saman og geva honum ta natúrligu gongd, sum er neyðug og avgerandi fyri ein lættan leik, sum hendan. Leikararnir hava tikið hvør sín leiklut í fullum álvara og eru farnir undir uppgávuna við stórum dirvi og eldhuga. Leikararnir hava víst, at væl ber til at spæla sjónleik, hóast trongar karmar, bæði tá talan er um leikpall og leikaratilfeingi á staðnum. Eingin orsøk er at setast aftur.

Leikararnir eru Eva Brekkstein, Amalia Danielsen, Beinta Jacobsen og Hanna Jacobsen av Velbastað, Hallur Hjalgrímsson úr Havn og Nicolaj Falck og Aksel Sigmund Joensen úr Nólsoy. Leikstjóri er Eva Brekkstein og Sverri Egholm hevur ráðgivið.

Leikurin verður sýndur aftur í Sólarmagni á Velbastað leygardagin 29. og sunnudagin 30. apríl, báðar dagarnar kl. 17 og 19.30. Leygardagin 6. mai verður leikurin spældur í Royndarhúsinum í Nólsoy. Atgongumerki kunnu bíleggjast á tlf. 220296.

John Dalsgarð

Bilpakkar 2000 sumarið
www.smyril-line.fo
SMYRIL LINE
Tel 34 59 00
4 fólk í bíli
Danmark
Fráf. Tórshavn 19/5 26/5 2/6 9/6 1/9 8/9
Fráf. Hanstholm 13/5 20/5 27/5 3/6 10/6 17/6 19/8 26/8 2/9
Ferðist bíliga, Tórshavn-Hanstholm ella hinvegin
kr 775,- fyri hvønn
Noreg
Ferðist bíliga, Tórshavn-Bergen ella hinvegin
kr 480,- fyri hvønn
Hetland
Ferðist bíliga, Tórshavn-Lerwick ella hinvegin
kr 385,- fyri hvønn
Ísland
Fráf. Tórshavn 17/5 24/5 31/5 7/6 14/6 21/6 9/8 16/8 23/8 30/8
Fráf. Seyðisfjørður 25/5 1/6 8/6 15/6 22/6 24/8 31/8 7/9
Ferðist bíliga, Tórshavn-Seyðisfjørður ella hinvegin
kr 728,- fyri hvønn
Skotland
Ferðist bíliga, Tórshavn-Hetland-Skotland ella hinvegin
kr 1.273,- fyri hvønn
e-mail: booking@smyril-line.fo

Aftur til stig politikkin

Ikki øll sjálvstýrisáhugað eru samd við førda samgongupolitikkinum. Formaðurin í Norðoya Sjálvstýrisfelag metir í øllum førum, at rættast er at venda aftur til stig fyri stig politikk, og er Helena Dam á Neystabø við at finna aftur á hesa kós, heilsar hann henni vælkomnari

DAGFINN OLSEN

Landsfundur Sjálvstýrisfloksins er um vikuskiftið. Ein, ið fegnast um ábendingarnar um, at í fullveldismálinum verður lagt á varligari bógv, er formaðurin í Norðoya Sjálvstýrisfelag, Jan Asbjørnson Joensen.

Hann metir, at tað kann ikki koma óvart á nakran, um farið verður varligari til verka í fullveldisætlanini, tí hetta samsvarar betri við stevnuskrá Sjálvstýrisfloksins.

Ikki búgvin

At flokkurin hevur fingið vánalig úrslit í seinastu veljarakanningunum kundi bent á, at sjálvstýrisveljarar eru ikki samdir um førda politikkin hjá samgonguni. Jan A. Joensen avvísir ikki, at so er og at neyvan øll sjálvstýrisfólk eru glað fyri førda samgongupolitikkin.

- Viðvíkjandi fíggjarligu avleiðingunum, so er spurningurin, um ein lítil meiriluti skal hava loyvi til at kroysta nakað niður yvir hina helvtina, hvat livifótinum viðvíkir, sigur Jan Asbjørnson Joensen, sum eisini ivast stórliga í, um vit fólkaræðisliga og fyrisitingarliga eru búgving til tað, ið fullveldisætlanin leggur upp til.

Hann metir, at hyggur ein at føroyska umsitingarliga skrivstovuveldinum, so verður kappast um at gerast størst, men í dygd er eingin kapping at hóma.

Umhugsa kósina

- Eg meti, at rættast er at finna aftur til stig fyri stig politikkin. Vit eiga at byrja at gera fullveldi her heima á landi og ikki í Danmark, metir formaðurin í Norðoya Sjálvstýrisfelag, Jan Asbjørnson Joensen, undan landsfundi Sjálvstýrisfloksins.

- Eg eri samdur í, at vit eiga at stremba eftir sjálvstýri, men havi varhugan av, at landsstýrið hevur ov stóran skund. Sjálvstýrisflokkurin miðar eftir sjálvstýri, bygt á haldgóða grund og við skilagóðum loysnum her á landi, sigur Jan Asbjørnson Joensen.

- Eru veljarakanningarnar orsøk til, at meiningarnar hjá landstýrispolitikarum tiðna og blotna, so er hetta vælkomið. Ein eigur ikki at broyta meining eftir veljarakanningum, men slíkar kanningar kunnu benda á, um neyðugt er at umhugsa kósina. Um Helena Dam á Neystabø umhugsar sína støðu og finnur aftur á kósina, so er tað vælkomið, heldur Jan Asbjørnson Joensen í samband við, at løgmaður og Helena Dam á Neystabø eru komin við heldur varisligari úttalilsum seinastu tíðina viðvíkjandi fullveldisætlanini.

Jan Asbjørnson Joensen metir vera gott, at Sjálvstýrisflokkurin setti sum krav, at fólkið skuldi atkvøða um endaliga uppskotið, sum spyrst burtur úr samráðingunum millum Føroyar og Danmark, men hann vónar ikki, at landsstýrið hevur so stóran skund, at tað fer at beina fyri øllum framstigum á sjálvstýrisleið. Hetta, um fólkið vrakar uppskotið.

Sjálvur ivast Jan Asbjørnson Joensen ikki í undan landsfundi Sjálvstýrisfloksins, at rættast er at finna aftur til stig fyri stig politikkin.

- Eg eri samdur í, at vit eiga at stremba eftir sjálvstýri, men havi varhugan av, at landsstýrið hevur ov stóran skund, sigur Jan A. Joensen, formaður í Norðoya Sjálvstýrisfelag
Mynd: Jens Kristian Vang

Hilmar formaður í MáF

Á aðalfundinum hjá Meginfelag áhugaleikara Føroya herfyri stóðu hesi fyri vali:

Poulina Jensen úr Fívli í Sundalagnum, Hilmar Joensen úr Royndini úr Nólsoy og Heiðrún Hansen úr Samljóði í Skopun. Poulina, sum hevur sitið í nevndini síðani 1994 og verið formaður í MáF seinastu tvey árini, bar seg undan afturvali. Fyri hana varð valdur Svend Højgaard á Skála úr Stranda Sjónleikafelag. Hinir nevndarlimirnir eru Jógvan Ravnsfjall og Sverri Egholm úr ávíkavist Klaksvíkar og Havnar Sjónleikarafelag.

Hilmar Joensen í Nólsoy er formaður í MáF

Nevndin hevur nú skipað seg við Hilmari Joensen sum formanni, Sverra Egholm næstformanni og Jógvani Ravnsfjall sum kassameistara.

Á aðalfundinum søktu trý feløg um limaskap í MáF: Ungmannafelagið „Sólarmagn" av Velbastað, „Spírar" og Dramaverkstaðið við Hjørdis Johansen, bæði úr Havn. Sostatt eru nú 18 limafeløg í MáF.

Hilmar Joensen í Nólsoy er formaður í MáF